# ítróttur

Nr. 13 • hósdagur • 20. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ongin endurtøka av finaluni í fjør

**Mánakvøldið var lutakast um, hvussu spælast skal í kappingini um Løgmanssteypið, og greitt er, at finalistarnir frá í fjør, HB og NSÍ, hittast longu í øðrum umfari**

LØGMANSSTEYPIÐ

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Lutakastið fór fram í sambandi við sjónvarpssendingina 3-2 mánakvøldið, og ikki kann sigast annað, enn at lagt er upp til nakrar spennandi dystir, nú kappingin er broytt soleiðis, at tapir tú ein dyst, ert tú úti av kappingini.

### Gott lutakast hjá KÍ

Fyrsti dysturin í kappingini um Løgmanssteypið í ár verður tann 5. marts, tá ið FS Vágar fer til Hvalbiar at dystast við Royn. Hetta er einasti dysturin í undanumfarinum. Í fyrsta regluliga umfarinum av kappingini koma SÍ, LÍF, AB, Sumba og MB við upp í kappingini. Tá ið tað umfarið er avgreitt, koma øll liðini úr bestu deildini og B68 og B71 úr næstfremstu deildini við í kappingina, og tá er tað, at spenningur av álvara kemur í.

Til dømis er lutakastið fallið soleiðis út, at í øðrum umfari, sum verður leikt 20. marts, hittast finalistarnir frá í fjør, HB og NSÍ, í Gundadali, og tað plagar verða góðir dystir, tá ið hesi bæði lið hittast.

Eisini hitt havnarfelagið, B36, skal á eina trupla uppgávu, tá ið teir á útivølli skulu dystast við bronsuvinnararnar frá í fjør av Skála.

Bert í einum øðrum dysti er talan um eina uppgerð millum tvey lið úr bestu deildini, og tað er dysturin í Vági millum VB og ÍF.

Um tað er nakað av teimum størru feløgunum, sum tykist hava fingið eitt betur lutakast enn hini, so má tað verða KÍ. Klaksvíkingar skulu í fyrsta dystinum hitta vinnaran av dystinum millum Sumba og MB. Vinna teir tann dystin, so skulu teir spæla móti vinnaranum av EB/Streymi og B68.

### Kann gerast talan um havnarfinalu

Soleiðis sum lutakastið lagaði seg, er tað eisini so, at vit í ár kunnu fáa eina reina havnarfinalu millum tey bæði stóru havnarfeløgini B36 og HB, tí um hesi lið hittast í kappingini um Løgmanssteypið í ár, so verður tað ikki fyrr enn í sjálvari finaluni.

Hjá mongum havnarfólkum er hetta ein dreymafinala, og ikki síðani 1991 hava hesi bæði lið hitst í finaluni um Løgmanssteypið. Tá vann B36 1-0 við einum máli, sum Bergur Magnussen skoraði á ovara vølli í Gundadali.

Hvørji liðini verða, sum skulu spæla steypafinaluna á ólavsøku, verður ikki greitt fyrr enn stutt undan sjálvari finaluni. Í ár verða hálvfinalurnar nevnliga leiktar rættuliga seint í mun til undanfarin ár. Fyrru hálvfinalurnar verða leiktar 6. juli, og tær seinnu verða leiktar 24. juli, tað vil siga einans fimm dagar undan finaluni.




*Longu í fyrsta umfarinum av kappingini um løgmanssteypið tørna teir báðir finalistarnir frá í fjør saman*

### Liverpool úti av FA Cup

Enska stórfelagið Liverpool noyddist týskvøldið at siga farvæl til ársins útgávu av siðvandu steypakappingini FA Cup.

Liverpool leikti á útivølli móti Burnley úr næstfremstu ensku deildini, og heimaliðið vann dystin 1-0. Málið, ið kom í seinna hálvleiki, var eitt sjálvmál.

Sigurin hjá Burnley var uppiborin, tí sjáldan var vandi á ferð framman fyri málinum hjá danska Brian Jensen í Burnley-málinum. Hinvegin kunnu teir í Liverpool takka málverja sínum, Jerzy Dudek, fyri, at ósigurin ikki gjørdist størri.

### Boldsen og Bruun ikki við til HM

Sunnudagin byrjar HM í manshondbólti í Tunesia. Danir, ið verða mettir sum eitt tað sterkasta liðið í kappingini, hava verið illa plágaðir av skaðum undan kappingini, og nú er greitt, at tveir av stuðulsleikarunum ikki gerast klárir til kappingina.

Talan er um spælskiparan Joachim Boldsen og málverjan Michael Bruun. Serliga er missurin av Boldsen úr týska stórfelagnum Flensburg/Handewitt svárur, tí hann verur mettur sum ein tann besti playmakarin í heiminum. Í staðin fyri teir báðar eru Bo Spellerberg úr Kolding og Peter Henriksen úr GOG úttiknir.

### Beckham letur upp fyri United

Enski landsliðsskiparin David Beckham sigur í samrøðu við eitt blað, at um tað skuldi hent seg, at hann fór úr Real Madrid og aftur til Onglands, so hevði tað allarhelst verið til Manchester United, tí tað er hansara lið, sigur hann.

Tað hevur leingi gingið slatur um, at Beckham, sum ikki hevur havt tað lætt í Madrid, fór at venda aftur til Onglands, men sjálvur sigur enski miðvallarin, at hann ætlar sær at vinna spanska meistaraheitið og Champions League við Real Madrid, áðrenn hann fer aftur til Onglands.

**tn**

## Innandura rógvikapping

TÍÐINDASKRIV

Havnar Róðrarfelag skipar fyri innandura rógvikapping 29. januar 2005, kl. 10:00 í fimleikarhallunum hjá Tórshavnar kommunuskúla. Kappingin er fyri øll, bæði rógvarar og ikki rógvarar.

Róðrarfelagið hevur lánt báðar hallirnar til kappingina, ovara høll verður til upphiting og niðara til sjálva kappingina.

Bólkarnir eru:

- 16 ár og yngri
- 20 ár og yngri
- Opin bólkur
- 35 ár og eldri
- Blandaður bólkur
- Stafett

Tilmelding fer fram á heimasíðuni hjá Havnar Róðrarfelag www.drekin.fo

Seinasta freist at tekna seg er mánadagin 24 januar.

## Grand Prix kapping í borðtennis!

Um vikuskiftið bleiv 3. av 5 umførum i Grand Prix kappingini í borðtennis leikt í Ítróttarhøllini í Trongisvági. Undirtøkan til kappingina var avbera góð, tí ikki minni enn 90 leikarir luttóku í kappingini. Hesir leikarir komu úr TBF og TÓR.

Í kappingini í Trongisvági leygardagin, bleiv leikt i 12 bólkum, og har varð TBF tann stóri vinnarin, við tað at teir áttu 11 av 12 bólkavinnarum.

Grand Prix kappingin i borðtennis, verður annars spæld uppá ein, eitt sindur ørðvisi máta. Har verður einans leikt eftir styrki og ikki eftir aldri ella kyni. Allir leikarir, gentur og dreingir, eru styrkismettir á einum styrkislista, og verða bólkar siðani gørdir út fra hesum lista. Hetta ger kappingina munandi meiri áhugaverda, tí tá gerst talan ofta um tættar og harðar dystir. Hetta vísir seg at vera sera mennandi fyri leikararnar, og leikararnir eru eisini sera væl nøgdir við hesa skipan. Sagt verður eisini, at greið tekin eru uppá, at henda kappingarskipanin styrkir og mennir munandi um hvønn einstakan leikara, og vónandi fer hetta at síggjast aftur i nærmastu framtíð, tá ið føroyskir borðtennisleikarir fara at luttaka i kappingum uttanlands.

M.a ferð eitt ungdomslandslið i næsta mánað niður til Danmarkar, at luttaka i Brøndby Cup, har eisini leikarir úr øllum norðanlondunum fara at luttaka.

Bólkavinnararnir í Grand Prix 3 vóru hesir:

Bólkur A: Fríði Jensen, TBF
Bólkur B: Marin Í Dali, TBF
Bólkur C: Hanus Stórhamar, TBF
Bólkur D: Jákup Thomasen, TBF
Bólkur E: Páll Heri Nolsøe, TBF
Bólkur F: Martin Mortensen, TÓR
Bólkur G: Gudfinn Jespersen, TBF
Bólkur H: Heine M. Mortensen, TBF
Bólkur I: Rannvá Joensen, TBF
Bólkur J: Patrik Johannesen, TBF
Bólkur K: Anna Mikkjalsdóttir, TBF
Bólkur L: Marjun Lydersen, TBF